GREINING

# DANMARKS NATIONALBANK

13. NOVEMBER 2019 — NR. 22

FØROYSKUR BÚSKAPUR

# Sera lágt arbeiðsloysi trýstir arbeiðsmarknaðin

**Longdar uppgongutíðir orsakað av fólkatilflyting**

Eftirspurningurin er øktur nógv undir framburðinum síðan 2014, og teir góðu arbeiðsmøguleikarnir hava havt við sær, at fleiri og fleiri eru flutt til Føroya. Arbeiðsloysi er nú í botni, og tað kann hava við sær, at búskapurin verður ovurupphitaður.

**Støðufastur fíggjarpolitikkur er týðandi fyri føroyskan búskap**

Søguliga hevur føroyski búskapurin sveiggjað nógv, m.a. orsakað av, at útflutningurin mestsum bert hevur verið fiskur. Landsstýrið kann økja um støðufestið í búskapinum við at føra ein mótgangandi fíggjarpolitikk, m.a. ígjøgnum eina savnaða stýring av almennum útreiðslum og íløgum kring alt landið.

**Tey eldru gerast fleiri, og tað fer at leggja trýst á tann almenna fíggjarstandin í framtíðini**

Næstu áratíggjuni verða íbúgvarnir eldri og eldri, og tað ger, at skattainntøkurnar ikki fara at fylgja við teimum almennu útreiðslunum uttan at tænastustøðið lækkar. Til ber at bøta um hesa gongd, við at økja um arbeiðsútboðið ella við at herða fíggjarpolitikkin.

INNIHALD


2 STÓR BÚSKAPARLIG FRAMGONGD TEY SEINASTU SEKS ÁRINI

3 FÍGGJARPOLITIKKURIN ÁTTI AT LÆTT UM TRÝSTIÐ Á ARBEIÐSMARKNAÐINUM

5 TILFLYTING HEVUR LONGT UM UPPGONGUTÍÐIRNAR

6 FISKAÚTFLUTNINGURIN ER FYRIBILS KOMIN Í HÆDDINA

8 ØKT ÚTLÁN ÍGJØGNUM UPPGONGUTÍÐIRNAR

10 TANN ALMENNI FÍGGJARSTANDURIN HEVUR STÓRAR AVBJÓÐINGAR NÆSTU ÁRATÍGGJUNI

11 NÝSKIPANIR KUNNU TRYGGJA SAMANHANG MILLUM ALMENNAR INNTØKUR OG ÚTREIÐSLUR

# Stór búskaparlig framgongd tey seinastu seks árini

Tað hevur gingið framá hjá føroyska búskapinum tey seinastu seks árini. Sterkasta drívmegin aftan fyri framgongdina er stór prísøking á alilaksi og størri veiða av serliga makreli og sild. Hesar báðar orsøkirnar hava økt inntøkurnar og hava ført til størri almennan og privatan eftirspurning.

Arbeiðsvirkni er nógv vaksið. Tørvurin á arbeiðsmegi hevur havt fólkatilflyting við sær, og hetta hevur longt um búskaparligu uppgongutíðirnar. Teir nógvu nýggju íbúgvarnir hava lagt trýst á bústaðarmarknaðin, serliga í miðstaðarøkinum.

Vøksturin í arbeiðsvirkninum heldur fram fyrra hálvár í 2019, sí mynd 1. Arbeiðsloysið er fallið til beint yvir 1 prosent av arbeiðsfjøldini, og tað er á sama lága støði sum undan fíggjarkreppuni í 2008. Fíggjarpolitikkurin, ið hevur verið førdur undir núverandi uppgongutíðum hevur verið við til at styrkt framgongdina, og harvið hevur hann eisini økt trýstið á arbeiðsmarknaðinum.

Lønarvøksturin er øktur samstundis sum tað tøka tilfeingið í búskapinum er minkað, sí mynd 2. Enn er lønarvøksturin tó hóvligur og lægri enn undir hákonjunkturinum, sum var undan hesum. At lønarvøksturin ikki er hægri kemst av, at arbeiðsfjøldin er økt, og tálmaður vøkstur hevur verið í brúkaraprísunum. Heldur trýstið á arbeiðsmarknaðinum fram við lágum arbeiðsloysi, so økir tað um vandan fyri, at búskapurin verður ovurupphitaður.

Brúkararnir eru bjartskygdir, og stór framgongd hevur verið í keypsorkuni undir uppgongutíðunum. Síðani 2013 er reallønin økt við sløkum 20 prosentum. Álitisábendingar hjá vinnulívinum liggja sum heild á høgum støði, burtursæð frá byggivinnuni, har bíleggingarnar eru heldur færri enn áður. Búskaparráðið væntar, at vøksturin í føroyskum búskapi heldur fram restina av 2019 orsakað av øktum útflutningi og innanlands eftirspurningi, serliga frá vanligu húsarhaldunum.[1]

**Fakta um Føroyar**

| | |
|---|---|
| Fólkatal (august 2019) | 52.122 |
| Bruttotjóðarúrtøka, BTÚ (2018, mia. kr.)[1] | 19,3 |
| pr. íbúgva[2] (1.000 kr.) | 369,5 |
| Gjaldoyra | Donsk króna |

Kelda: Hagstova Føroya, Danmarks Statistik og egnar útrokningar.
1. BTÚ er eitt mett tal frá Hagstovu Føroya og Búskaparráðnum.
2. Til sammetingar var BTÚ pr. íbúgva í Danmark 384.000 kr. í 2018.

**Stórur vøkstur í arbeiðsvirkninum trýstir arbeiðsloysi niður** Mynd 1




Viðm.: Talið av arbeiðstøkum og løntakarum er árstíðarjavnað.
Kelda: Hagstova Føroya.

Brúkararnir hava higartil verið meira afturhaldandi enn undir uppgongutíðum, undan teimum núverandi, teimum núverandi, og nýtslukvotan er nakað lægri nú enn fyri tíggju árum síðani. Útlánini hjá bankunum er økt, men ikki so skjótt sum bruttotjóðarúrtøkan, BTÚ. Uppgongutíðirnar hava tí verið harðførari enn fyrr hava verið dømi um, t.d. beint upp undir fíggjarkreppuna. Tískil er búskapurin meira mótstøðuførur, tá ið konjunkturarnir fara at venda.

1 Sí Búskaparráðið, Búskaparfrágreiðingar, heystið 2019 (*leinki*).

**Heimsfevnandi hóttafall fer at ávirka føroyskan búskap**
Útlit eru til, at føroyskur búskapur fær minni undanvind frá tí heimsfevnandi eftirspurninginum tey komandi árini. IMF og OECD vænta í teirra nýggjastu forsøgnum, at vøksturin í heimfevnandi BTÚ, fellur. Lægri vakstrarferðin kemst av minking í vinnuframleiðsluni í nógvum stórum londum. Afturgongdin er fyri ein part úrslit av øktari óvissu um handilsósemjuna millum serliga USA og Kina. Eisini er politisk óvissa um framtíðar handilssambond ímillum Stóra Bretland og ES. Ábendingar eru um, at tað er stórur vandi fyri einum heimsumfevnandi búskaparligum hóttafalli innan tvey ár.[2] Tað økir um vandan fyri búskaparligum hóttafalli í føroyskum búskapi.

Eins og Danmark eru Føroyar ein lítil og opin búskapur, sum í stóran mun er tengdur at samhandli við onnur lond. Tó at tann føroyski búskapurin er nógv øðrvísi enn t.d. tann danski, so hava konjunkturarnir í hesum báðum londum verið rættiliga eins, sí mynd 3. Ein heimsfevnandi búskaparlig afturgongd kann tí væntandi hava ávirkan á føroyskan búskap.

Steðgurin í nógvum londum hevur enn ikki rakt tann føroyska arbeiðsmarknaðin, einamest tí at Føroyar eru so tengdar at fiskaútflutningi. Veiðan og framleiðslan av laksi í alibrúkunum eru stórt sæð ikki ávirkað av altjóða búskaparligum sveiggjum. Hinvegin er útflutningurin viðkvæmur fyri prísbroytingum á útflutningsvørum- og tænastum uttan úr heimi. Innflutningurin er ikki eins viðkvæmur og útflutningurin, ta sokallaða býtislutfallið. Fallið í útflutningsvirðinum tað seinasta árið er júst ein avleiðing av, serliga, lægri laksaprísum. Um tað avspeglar eitt altjóða búskaparligt hóttafall er óvist. Heimsmarknaðarprísir fyri t.d. laks eru ógvuliga viðkvæmir fyri menningini av alibrúkum í øðrum londum.

## Fíggjarpolitikkurin átti at lætt um trýstið á arbeiðsmarknaðinum

Hóvligi vøksturin í útflutninginum og øktur vandi fyri einum heimsfevnandi hóttafalli merkir ikki, at

**Tálmaður lønarvøkstur uttan fyri fiskivinnuna hóast lágt arbeiðsloysi** Mynd 2




Viðm.: Lønarvøksturin er roknaður sum eitt undirskilt lønarindeks grundað á lønargjaldingar og tal av løntakarum. Fiskivinnan og aðrar tilfeingisvinnur eru ikki roknaðar við, tí at lønir í hesum vinnum eru tengdar at veiðuni. Lønargjaldingar í fiskivinnuni virka soleiðis, at løntakarnir á ein hátt býta yvirskotið millum sín, og tað vísir ikki ta røttu myndina av lønartrýstinum sum heild í Føroyum, ið m.a. er komið av vantandi arbeiðsmegi.
Kelda: Hagstova Føroya og egnar útrokningar.

**Konjunkturarnir í føroyskum og donskum búskapi hava søguliga vent sær samstundis** Mynd 3




Viðm.: Leggið til merkis, at munur eru á stigunum fyri Danmark og Føroyar og at sveiggini fyri Føroyar tí eru lutfalsliga størri enn fyri Danmark.
Kelda: Danmarks Statistik og Hagstova Føroya.

2 Sí Deanie M. Haugaard Jensen og Rasmus Mose Jensen, Risikoen for global recession er steget, *Danmarks Nationalbank Analyse*, nr. 16, august 2019.

føroyskur búskapur hevur tørv á einum stimbrandi fíggjarpolitikki. Tað stóra kapacitetstrýstið í búskapinum fer ivaleyst heilt natúrliga at tálma framgongdini á arbeiðsmarknaðinum.

Landsstýrið kann lætta um trýstið her og nú, við at tryggja ein herdan fíggjarpolitikk í 2020. Herðingin fer at tálma eftirspurninginum og harvið minka um trýstið á arbeiðsmarknaðinum. Herðingin kann verða ígjøgnum afturhaldssinni á rakstrarútreiðslunum og í nýggjum byggi- og verklagsætlanum hjá bæði landi og kommunum. Landsstýrið legði uppskot til fíggjarlógina fyri 2020 fram í september grundað á tøkniligar framskrivingar. Politisku raðfestingarnar hjá landsstýrinum eru enn ikki tøkar orsakað av løgtingsvalinum, sum var 31. august.

**Fíggjarpolitikkurin hevur higartil økt trýstið á arbeiðsmarknaðinum**

Hægri skattainntøkur og stór búskaparlig framgongd hava higartil verið umskift til størri almenna nýtslu. Samanhangurin millum privat og alment virksemi sæst týðiliga í arbeiðsvirkninum. Talið á almennum størvum er økt munandi undir núverandi uppgongutíðum, samstundis sum talið á privatum størvum eisini er økt, sí mynd 4.

Afturat øktum rakstrarútreiðslum hevur tað almenna eisini sett fleiri byggi- og verklagsætlanir í gongd t.d. skúlar, sjúkrahús og infrakervi. Tað hevur økt trýstið í byggivinnuni, ið frammanundan er ógvuliga konjunkturviðkvom. Samanumtikið hevur fíggjarpolitikkurin harvið stimbrað føroyskan búskap í einum tíðarskeiði við kapacitetstrýsti.

Tað er einki nýtt fyribrigdi, at nýtsla og íløgur hjá tí almenna eru við til at økja trýstið á arbeiðsmarknaðinum undir einum føroyskum hákonjunkturi. Útrokningar hjá Búskaparráðnum hava víst, at søguliga hevur fíggjarpolitikkurin styrkt sveiggini í tí føroyska búskapinum, t.v.s., at fíggjarpolitikkurin hevur verið prosykliskur.[3]

**Tað almenna hevur styrkt uppgongutíðirnar** Mynd 4




Viðm.: Pílarnir vísa á økingina í løntakarum frá 2013 til 2018.
Kelda: Hagstova Føroya.

**Karmarnir fyri kommunalan búskap áttu at verið broyttir**

Ein stórur partur av almennum tænastum verða røktar av teimum 29 kommununum í landinum. Tænasturnar verða fíggjaðar ígjøgnum m.a. skatt, ið er tengdur at inntøkunum í hvørjum húsarhaldi sær og vinnugrundarlagnum í kommununi. Kommunurnar fáa ikki bloksstuðul frá landinum, sí boks 1. Ein týðandi partur av økingini í almennum størvum síðan 2013 er innan fyri tær einstøku kommunurnar.[4]

Núverandi búskaparligu karmarnir hjá kommununum eru við til at styrkja prosyklikalitetin í tí kommunala nýtslu- og íløgumynstrinum. Kommunur sleppa t.d. ikki at spara upp til komandi ár, men skulu brúka eitt møguligt avlop í fíggjarætlanini til antin lægri skatt, nýggjar útreiðslur ella íløgur. Búskaparligu karmarnir hjá kommununum tarna møguleikunum hjá landsstýrinum at føra ein støðufestandi fíggjarpolitikk.

3 Sí Búskaparráðið, Búskaparfrágreiðingar, heystið 2015 *(leinki)*.

4 Hagstova Føroya flokkar kommunur v.m. uttan tað mesta av eldraøkinum, tí at økið ofta liggur í felagskommunalum samstarvi. Hædd er tikin fyri, at talið av almennum størvum í Tórshavnar kommunu broyttist, við tað at eldraøkið varð lagt út til kommunurnar við ársskiftið 2015/16.

Tað hevði verið gagnligt at skipað karmarnar fyri fíggjarpolitikkin av nýggjum. Tað kundi latið seg gjørt við at broytt stýringina av kommunum og lagt fíggjarætlanirnar hjá landsstýri og kommunum fastar í bindandi avtalur. Ein slík nýskipan kann virka við til, at tann búskaparliga menningin verður støðugari framyvir. Føroyskur búskapur er eyðkendur við týðiligum sveiggjum orsakað av bundinskapinum av fiski, sí boks 2. Tað undirstrikar, hvussu týðandi tað er at føra ein støðufestan búskaparpolitikk.

## Tilflyting hevur longt um uppgongutíðirnar

Síðan ársbyrjan 2013 er arbeiðsvirkni økt við 16 prosentum. Framgongdin er serliga í byggivinnuni og hjá tí almenna. Ein partur av økinigini í arbeiðsvirkninum í byggivinnuni er ein avleiðing av teimum mongu stóru almennu byggi- og býarskipanarverkætlanum t.d. skúlar, havnaútbyggingar og tunlar. Økingin í størvum í byggivinnuni tykist vera steðgað. Hetta fellur saman vi, at bíleggingarnar til byggivinnuna, sambært konjunkturábendingum frá Hagstovu Føroya eru fallandi.

Framgongdin í arbeiðsvirkninum hevur trýst arbeiðsloysið niður á einans 1,2 prosent í juli. Tað er eins lágt sum tað var, tá ið hákonjunkturin undan fíggjarkreppuni var uppá sítt hægsta og tekin um, at arbeiðsmarknaðurin er ógvuliga trýstur. Tað lága arbeiðsloysið er ein avbjóðing fyri fyritøkur, tí tær ikki fáa fólk í starv og harvið avmarkar tað framleiðsluna.

Góðu arbeiðsmøguleikarnir tey seinastu árini hava økt um arbeiðsfjøldina, við tað at fleiri eru flutt til Føroya, sí mynd 5. Økt tilflyting undir einum hákonjunkturi av serliga føroyingum, ið hava verið búsitandi uttanlands er eitt vælkent fyribrigdi í Føroyum. Hinvegin flytur ein partur av føroyingum uttanlands, tá ið búskaparligu korini versna. Tað seinasta árið eru tó eisini komnir tilflytarar úr serliga eysturevropeiskum londum.

### Kommunurnar hava fríar karmar at økja rakstrar- og verklagsútreiðslur

Boks 1

Kommunurnar røkja m.a. uppgávur innan barna- og eldraøkið eins og teir materiellu karmarnar í fólkaskúlanum.[1]

Øvugt Danmark verða karmarnir hjá kommununum fyri útreiðsluvøkstur ikki lagdir fastir í árligum fíggjarætlanarsamráðingum millum landsstýri og kommunur. Heldur ikki er ein javningarskipan millum kommunurnar, ið hevur til endamáls at beina pening til kommunur við serligum fólkatalsfrøðiligum avbjóðingum orsakað av t.d. nógvum røktarkrevjandi eldri borgarum. Kommunurnar verða fyrst og fremst fíggjaðar av inntøkuskatti frá íbúgvum í kommununi, og 30 prosent av landsins inntøkum frá vinnufelagsskatti verða førdar yvir til kommunurnar.

Harafturat veitir landið skattainntøkur frá pensjónsinngjaldingum, har kommunur við fleiri eldri borgarum fáa eina størri upphædd pr. borgara enn hinar kommunurnar. Hartil kemur, at landið endurrindar kommununum fyri mista skattainntøku fyri teir borgarar í kommununum, ið ikki gjalda skatt í Føroyum orsakað av starvi og skattgjalding uttanlands.

Eitt skuldarhámark er álagt kommununum, men í búskaparligum uppgongutíðum er hetta vanliga ikki viðkomandi.

1. Landið umsitur sjálva undirvísingina í fólkaskúlanum.

### Stórur partur av tørvinum á arbeiðsmegi verður nøktaður ígjøgnum tilflyting

Mynd 5




Viðm.: Nettotilflyting er glíðandi 12 mðr. summur.
Kelda: Hagstova Føroya.

## Fiskaútflutningurin er fyribils komin í hæddina

Útflutningurin er øktur nógv ígjøgnum uppgongutíðirnar. Hetta er ein avleiðing av lagaligum umstøðum í bæði alibrúkunum og fiskivinnuni. Framgongdin í útflutninginum var fyribils í hæddini í 2017. Í 2018 og 1. hálvár 2019 hevur útflutningsvirðið ligið á sama støði orsakað av víkjandi prísum á heimsmarknaðinum innan bæði ali- og fiskivinnu.

**Alibrúkini fáa verri prís fyri laks**
Alibrúkini hava tey seinstu árini selt laks fyri sera høgan prís; so høgan, at útflutningsvirðið er tvífaldað síðan 2012. Síðan við ársbyrjan 2018 er útflutningurin hjá alibrúkunum lækkaður orsakað av lægri prísum á heimsmarknaðinum og einum lítlum fallandi trendi í laksatøkuni, sí mynd 6.

Framleiðsluorkan hjá alibrúkunum hevur fyribils rokkið lívfrøðiliga markinum í firðunum, sum kann sameinast við m.a. fyribyrging av sjúkum. Í øðrum londum við nógvari alivinnu verður framleiðslan regluliga órógvað av sjúkum ella stórum mongdum av æti.

Laksasjúkur hava fyrr verið ein trupulleiki í føroysku alivinnuni. Seinast var í 2017 tá laksasjúkan infektiøs laksaanæmi, varð staðfest í einum alibrúki undir einari vanligari eftirlitsrundu. Neyðugu stigini vórðu tikin, og tað menti seg ikki til eitt kliniskt útbrot. Sjúkutilburðurin undirstrikar, hvussu týdningarmikið tað er at hava gott djóralæknafrøðiligt eftirlit av Føroya størstu útflutningsvinnu.[5]

Tann størsta alifyritøkan, Bakkafrost, er mitt í einari íløguætlan, ið kann víðka framleiðsluna við m.a. virksemi á landi. Økt framleiðsla minkar váðan fyri órógvi í framleiðsluni orsakað av sjúkum sum t.d. laksalús.[6]

**Fiskiveiðan er fallin eitt sindur síðan 2018**
Fiskivinnan hevur notið væl av nógvari veiðu, ið seinastu árini eisini er seld fyri hægri prís, sí mynd 7. Serliga veiðan eftir makreli og sild, tey sokallaðu pelagisku fiskasløgini, hava givið útslit rætta vegin.

**Stórur bundinskapur til fiskivinnuna ger búskapin sárbæran** Boks 2

Føroyar hava ein lítlan og opnan matvøruútflytandi búskap, ið er miðsavnaður um fiskavørur. Fiskivinnan og alivinnan eru ein sættipartur av tí samlaðu bruttovirðisøkingini og stórt sæð allur vøruútflutningurin. Sostatt er virksemi í Føroyum viðkvæmt fyri broytingum í fiskastovnum og -prísum. Báðir partar broytast sum frá líður, men ymisku veiðuhættirnir og fiskasløgini fara ikki neyðturviliga sama veg. Avkastið býtir seg út á fleiri ymisk sløg av fiskivinnu. Henda útbreiðslan ger í ein ávísan mun sítt íkast til, at búskapurin sum heild er minni sárbærur. Føroyar hevur harafturat avtalur við onnur lond, ið gevur fiskivinnuni atgongd til at fiska í sjóøkjum, ið hoyra til onnur lond.[1] Hesar avtalur kunnu minka um bundiskapin av, hvussu stórir fiskastovnarnir eru í føroyskum sjóøki, og tað ger búskapin minni sárbæran fyri sveiggjum í hesum stovnum. Tað broytir tó ikki ta stóru heildarmyndina av einum búskapi, sum til tíðir vísir stór sveiggj. Afturgongd í fiskivinnuni kann beinleiðis og óbeinleiðis elva til hall í bankageiranum og styrkja sveiggini í realbúskapinum enn meira.

1. Sí boks 1 i Sune Malthe-Thagaard, Højkonjunktur og pres på arbejdsmarkedet, *Danmarks Nationalbank Analyse (Færøsk økonomi),* nr. 17, september 2017.

**Útflutningsvirðið á laksi er fallið, serliga orsakað av lægri prísum** Mynd 6




Viðm.: Útflutningsnøgdin er glíðandi 12 mðr. summur, meðan prísurin er eitt miðaltal ígjøgnum 12 mðr.
Kelda: Hagstova Føroya.

5 Sí Rigsombudsmanden på Færøerne, *Beretning*, 2019 *(leinki)*.

6 Sí Bakkafrost, *Interim report Q2 2019 and H1 2019 (leinki)*.

Hinvegin hevur tann siðbundna veiðan eftir toski, hýsu og seiði, tann sokallaði botnfiskurin, verið minni, samstundis sum prísurin eisini hevur verið lægri.[7] Lutfalsligu lágu oljuprísirnir, sum hava verið síðan 2015 hava sum heild stuðlað undir avkastið í fiskivinnuni. Í 2018 er útflutningurin frá fiskivinnuni fallin nakað.

Útlit eru til, at pelagiska veiðan í høvuðsheitum kann verða verðandi støðug í 2020. Veiðan eftir sild og svartkjafti hevur tó verið hægri enn tilmælini frá havlívfrøðingunum í International Council for the Exploration of the Sea, ICES, í fleiri ár, og tað kann gera, at fiskastovnarnir sum frá líður gerast óstøðugir.[8] Fyri botnfiskasløgini er tað serliga toska- og hýsustovnarnir, ið batna, og tað kann økja um veiðuna í tí partinum av fiskiflotanum framyvir.[9]

### Stórur bundinskapur til fiskaútflutning ger føroyskan búskap sárbæran

Bundinskapurin av gongdini í fiskaútflutninginum ger føroyskan búskap sárbæran. Framgongdin í fiskaútflutninginum seinastu árini er serliga á russiska marknaðinum. Framgongdin er úrslit av betri marknaðaratgongd, eftir at Russland setti handilsbann á matvørur úr ES og fleiri øðrum londum, eftir at hesi somu lond settu revsitiltøk í verk ímóti Russlandi. Føroyar eru ikki limur í ES og eru tí ikki fevndar av handilsbanninum.

Tann føroyska atgongdin til tann russiska marknaðin hevur ført við sær hægri avrokningarprís samanborið við, tá ið ES-lond eisini kundu selja vørur í Russlandi. Føroyskur útflutningur er tí møguliga sárbærur, um handilssambondini við Russland og ES verða opnað aftur. Størri landafrøðilig spjaðing er tó í føroyskum útflutningi í dag enn fyri 15-20 árum síðani.

Við tað at ferðavinnan hevur verið í stórari framgongd tey seinnu árini er føroyskur útflutningur vorðin eitt sindur meira fjølbroyttur. Framgongdin

**Fiskivinnan gekk nakað aftur í 2018 eftir fleiri árum við stórari framgongd** Mynd 7




Viðm.: Árlig broyting í útflutninginum er tvíbýtt í prís- og mongdarbroyting og er ein meting. Fiskaútflutningurin er uttan laks.
Kelda: Hagstova Føroya.

**Føroyar eru vorðnar vælumtóktari sum ferðamál** Mynd 8




Kelda: Vága floghavn og Hagstova Føroya.

7 Sí Rigsombudsmanden på Færøerne, *Beretning*, 2019 *(leinki)*.

8 Sí International Council for the Exploration of the Sea, ICES Advice on fishing opportunities, catch, and effort (Northeast Atlantic and Arctic Ocean), (sild: *leinki*; makrelur: *leinki*; svartkjaftur: *leinki*).

9 Sí International Council for the Exploration of the Sea, ICES Advice on fishing opportunities, catch, and effort (Northeast Atlantic and Arctic Ocean), (torskur: *leinki*; hýsa: *leinki*).

sæst í øktum ferðafólkastreymi á flogvøllinum, og í fleiri størvum innan hotell- og matvøruvinnuna, sí mynd 8.[10]

Talið á gistingum á hotellum, gistningarhúsum o.ø. er økt við 40 prosentum síðan 2013. Harafturat kemur útleiga av privatum heimum ígjøgnum t.d. Airbnb umframt árin á aðrar vinnugreinar. At Føroyar eru vorðnar vælumtóktari sum ferðamál hevur ført við sær hægri nýtslustig á hotellunum kring landið. Tí eru fleiri nýggj hotell í gerð, m.a. í Tórshavn. Hagstova Føroya metir, at parturin hjá ferðavinnuni í bruttovirðisøkingini, er øktur frá 1,4 prosentum í 2011 til 2,1 prosent í 2017.[11]

## Økt útlán ígjøgnum uppgongutíðirnar

Vøksturin í útlánum hevur verið positivur síðani 2014, og í 2017 var hann hægri enn vøksturin í BTÚ, sí mynd 9. Vøksturin í útlánum kann møguliga vaksa ógvusliga upp á fá ár, eins og hann gjørdi t.d. upp undir fíggjarkreppuna.[12]

Vøksturin í BTÚ hevur í nógv ár verið størri enn vøksturin av útlánum. Tað bendir m.a. á, at íløgurnar hjá fyritøkum eru fíggjaðar av uppsparing, avkasti ella lántøku í útlendskum bankum.

Útlán til føroysk húsarhald fylla yvir helvtina av útlánum hjá føroyskum bankum í Føroyum. Fyrst og fremst eru tað bankalán til bústaðarendamál. Lán til húsarhald eru síðani 2014 økt við uml. 3,8 prosentum um árið.[13] Síðan við endan á 2017 hevur øktur vøkstur verið í donskum realkredittlánum til føroyingar. Realkredittlán vóru við endan á 1. hálvári 2019 ein fjórðingur av tí samlaðu bústaðarfíggingini, og tað eru teir føroysku bankarnir, ið umsita tey.

**Vøksturin í útlánum frá teimum føroysku bankunum øktist ígjøgnum uppgongutíðirnar** Mynd 9




Viðm.: Tøl til og við 1. hálvár 2019. Tøl fyri BTÚ fyri 2017-18 eru fyribils. 1. hálvár 2019 er ein meting av vøkstri í útlánum og BTÚ í 1. halvár. Tað samlaða útlánið er so vítt gjørligt reinsað fyri útlán til útlendskar kundar.
Kelda: Búskaparráðið og innlatingar til Finanstilsynet.

**Hækkandi bústaðarprísir kunnu økja um bruttoskuldina hjá húsarhaldunum**

Ein orsøk til ta øktu lánveitingina til húsarhald er, at húsaprísirnir eru hækkaðir munandi síðani 2014. Príshækkingin er hend, samstundis sum inntøkurnar í húsarhaldunum eru øktar, og renturnar falnar. Húsaprísirnir eru hækkaðir mest í miðstaðarøkinum og lógu 1. hálvár 2019 41 prosent hægri enn í 2014, sí mynd 10. Prísstøðið í miðstaðarøkinum er komið á eitt støði, sum færri húsarhald kunnu og vilja gjalda. Fleiri leita sær tí út um høvuðsstaðarøkið, og tað hevur ført til hægri húsaprísir aðra staðni í landinum. Húsaprísir kunnu vera ein høvuðsábending um kredittvøkstur.[14] Tí kunnu hækkandi bústaðarprísir føra við sær hægri vøkstur í útlánum til húsarhald og harvið til hægri bruttoskuld.

10 Ein partur av framgongdini kemur eisni av, at føroyingar sjálvir ferðast meira og eta oftari á matstovum.

11 Sí Hagstova Føroya, Vitjandi ferðfólk, 2011 til 2018, Búskaparískoyti, maj 2018 (*leinki*).

12 Sí *Gongdin í bankageiranum*, Landsbanki Forøya, maj 2019 (*leinki*).

13 Sí hagtøl frá Danmarks Nationalbank yvir javnar og streymar fyri peninga- og fíggjarstovnar (MFI bólkurin).

14 Si Oliver Grinderslev, Paul Lassenius Kramp, Anders Farver Kronborg og Jesper Pedersen, Financial cycles: What are they and what do they look like in Denmark?, *Danmarks Nationalbank Working Paper*, nr. 115, juni 2017.

Sløk 92 prosent av lánum hjá húsarhaldum til bústaðarendamál (bankalán og donsk realkredittlán tilsamans) hava broytiliga rentu. Tískil kann ein høg bruttoskuld hava avleiðingar fyri tað fíggjarliga støðufestið, um renturnar vaksa.

### Stórt innlánsyvirskot kann skunda undir lagalig kredittkor

Vøksturin í útlánum hjá teimum føroysku bankunum hevur í miðal ligið undir vøkstrinum í innlánum. Tað hevur ført til, at innlánsyvirskotið[15] hjá bankunum er vaksið, ið var 5,8 mia. kr., tá ið 1. hálvár 2019 endaði, sí mynd 11, og vóru 18 prosent av teirra samlaðu ogn. Menningin er m.a. komin av, at fíggjarstøðan hjá bæði húsarhaldum og vinnufyritøkum er styrknað orsakað av búskaparligu uppgongutíðunum.

Tann lága rentan kann leggja trýst á rentumarginalin hjá bankunum og harvið trýst á eina av teirra inntøkukeldum. Tí er vandi fyri, at tað stóra innlánsyvirskotið kann skunda undir at linka kredittstøðið í kappingini um kundarnar. Fleiri bankar vísa júst á øktu kappingina sum ein av orsøkunum til, at rentumarginalurin er lækkaður.[16]

### Uppgongutíðirnar hava givið sítt íkast til eitt stórt avkast hjá bankunum hóast lága rentu

Eginpeningsavkastið hjá bankunum hevur verið yvir miðal síðan 2016, sí mynd 12. Menningin er fyrst og fremst íkomin orsakað av størri útlánum.

Kjarnukapitalprosentið hjá teimum føroysku bankunum er í miðal økt við 4 prosentstigum síðan 2015. Økingin er m.a. orsakað av, at krøvini til kapitalbólstringina hjá teimum føroysku bankunum eru økt. Kapitalvarðveitingarbuffarin og tann systemiski buffarin eru stigvíst slúsaðir inn síðan ávikavist 2016 og 2018. Síðani 2016 er SIFI[17]-buffarin eisini slúsaður inn fyri teir tríggjar systemiskt týðandi bankarnar. Í mars 2019 avgjørdi Det Systemiske Risikoråd í Danmark at seta

**Vaksandi bústaðarprísir í Tórshavn spjaða seg kring landið** Mynd 10




Viðm.: 2019 fevnir bert um tveir ársfjórðingar, og tí er eitt avmarkað tal av handlum. Hús í restini av landinum er eitt miðaltal av vísitalinum fyri stórar og smáar býir, Sandoy og Suðuroy undantiknar.
Kelda: Hagstova Føroya og BankNordik.

**Innlánsyvirskotið er økt síðan 2014** Mynd 11




Viðm.: Húsarhald íroknað almannagagnligir stovnar rættaðir ímóti húsarhaldum (NPISH). Onnur fíggjarlig feløg eru øll fíggjarlig feløg uttan tjóðbankar, bankar, realkredittstovnar ella gjaldsstovnar o.a.
Kelda: Danmarks Nationalbank.

15 Innlánsyvirskotið vísir innlán hjá teimum føroysku peningastovnunum, har útlán eru drigin frá. Inn- og útlán eru uttan mótpartar, ið eru tjóðbankar, bankar, realkredittstovnar ella gjaldsstovnar o.a. Bankadeildir hjá teimum føroysku peningastovnunum uttanlands eru roknaðar við í innlánsyvirskotið. Harafturat verður innlánsyvirskotið eisini repokorrigerað, so repoinnlán og repoútlán ikki eru partur av innlánsyvirskotinum. Sí hagtøl frá Danmarks Nationalbank yvir javnar og streymar fyri peninga- og fíggjarstovnar (MFI bólkurin).

16 Sí *Annual report 2018,* BankNordik (*leinki*), *Årsrapport 2018*, Norðoya Sparikassi (*leinki*), *Ársfrásøgn 2018*, Betri Banki P/F (*leinki*).

17 Systemiskt týdningarmikil fíggjarstovnur.

eina greining av kapitalbuffarum í Føroyum í gongd, í samstarvi við Føroya váðaráð.[18]

## Tann almenni fíggjarstandurin hevur stórar avbjóðingar næstu áratíggjuni

Eins og nógv onnur lond hava Føroyar stórar avbjóðingar við at tryggja javnvág ímillum inntøkur og útreiðslur á teimum almennu fíggjarætlanunum í framtíðini. Tað kemst millum annað av, at talið á borgarum yvir 70 ár næstan verður tvífaldað til góð 11.000 fólk fram ímóti 2058, sí mynd 13. Av hesum fara útreiðslurnar til pensjón og heilsuverk at vaksa. Samstundis fara skattainntøkurnar at minka, tí tað verða færri fólk í arbeiðsførum aldri.

Tann almenni føroyski fíggjarstandurin fær væntandi meira mótvind enn t.d. tann danski.[19] Tað kemst m.a. av, at framskrivingar fyri fólkatalið treyta, at nettofráflytingin verður á støði við miðaltalið síðani 1985.[20] Hóast nettotilflytingin tey seinastu árini hevur verið høg, vísir tann søguliga menningin, at tað skjótt kann venda til nettofráflyting, tá ið búskapurin vendir, sí mynd 14.

Framskrivingar fyri, hvussu stórt fólkatalið verður fleiri áratíggju fram í tíðina eru eyðsæð óvissar, serliga við atliti til menningina í føðitali og nettotilflyting. Tað broytir tó ikki myndina av, at tann føroyski búskapurin eru í einum hørðum fólkafrøðiligum mótvindi. Sostatt fer tað almenna undirskoti væntandi at vaksa tey næstu 40 árini, um landsstýrið ikki fer undir víðfevndar nýskipanir.

Búskaparráðið roknaði í 2015, at tørvur er á eini varandi herðing í fíggjarpolitikkinum upp á 5 prosent av BTÚ fyri at tryggja samanhang ímillum útreiðslur og inntøkur sum frá líður, eitt sokallað fíggjarpolitiskt haldføri.[21]

**Eginpeningsavkastið hevur verið yvir miðal síðan 2016** Mynd 12




Viðm.: Eginpeningsavkaster er vektað miðaltal hjá teimum fýra føroysku bankunum í tíðarskeiðinum 1. ársfjórðingur 2014 til 1. hálvár 2019.
Kelda: Innlatingar til Finanstilsynet.

**Fólkafrøðiligur mótvindur veksur tey komandi áratíggjuni** Mynd 13




Kelda: Hagstova Føroya.

18 Sí Det Systemiske Risikoråds pressemeddelelse, 26. marts 2019 (*leinki*).

19 Sí Sune Malthe-Thagaard, Økt trýst á arbeiðsmarknaðin, *Danmarks Nationalbank Greining (Føroyskur búskapur)*, nr. 17, november 2018.

20 Sí Búskaparráðið, *Búskaparfrágreiðingar*, heystið 2019 *(leinki)*.

21 Sí Búskaparráðið, Búskaparfrágreiðingar, várið 2015 *(leinki)*.

**Pensjónsnýskipan ger sítt íkast til fíggjarpolitiskt haldføri**
Sjálvt um fleiri føroyingar arbeiða, eftir at teir eru vorðnir 67 ár, samanborið við nógv onnur lond, er tað ein týðiligur møguleiki fyri at økja um arbeiðsvirkni millum fólk oman fyri núverandi pensjónsaldur.

Í 2018 tók Løgtingið eitt týðandi fet rætta vegin tí viðvíkjandi við at hækka pensjónsaldurin við einum ári til 68 ár í 2030. Eftir hetta fer pensjónsaldurin partvís at fylgja menningini í livialdrinum. Sambært metingum hjá Búskaparráðnum frá 2015 fer ein øking í pensjónsaldrinum bara at loysa umleið ein fjórðing av haldføristrupulleikanum.[22]

**Teir mongu tilflytararnir kunnu skjótt fara avstað aftur, tá ið búskapurin vendir** Mynd 14




Kelda: Hagstova Føroya.

## Nýskipanir kunnu tryggja samanhang millum almennar inntøkur og útreiðslur

Tørvur er á fleiri nýskipanum í almenna geiranum fyri at fáa javnvág millum útreiðslur og inntøkur sum frá líður. Bæði menn og kvinnur eru longu meira á arbeiðslmarknaðinum enn í nógvum øðrum londum. Tí eru ikki stórir møguleikar at økja um arbeiðsvirkni fyri fólk í arbeiðsførum aldri ígjøgnum nýskipanir.

Tað vil so siga, at tríggir møguleikar av nýskipanum eru, ið kunnu fáa javnvág í tær almennu fíggjarætlanirnar sum frá líður: Pensjónsaldurin skal lagast til menningina í livialdrinum, hægri skattur og lægri útreiðslur til almennar tænastur.

**Hægri pensjónsaldur kann geva sítt íkast til at betra um fíggjarpolitiska haldføri**
Pensjónsaldurin fer við núverandi reglum at vera 70 ár í 2050, um livialdurin heldur fram at hækka við somu ferð sum higartil. Til sammetingar verður pensjónsaldurin í Danmark 72 ár. [23] Munurin kemst m.a. av, at í Føroyum er eitt loft, ið forðar pensjónsaldrinum at vaksa meira enn eitt hálvt ár fimta hvørt ár. Tey seinastu 20 árini er tann væntaði livialdurin tvífaldaður. Um sama menning heldur fram, fer loftið í vísitalsregluni at føra við sær, at áramálið sum pensjónistur fer at vaksa.

Við fleiri pensjónsnýskipanum ber til at loysa avbjóðingarnar við fíggjarpolitiskum haldføri, soleiðis at pensjónsaldurin t.d. fylgir menningini í tí væntaða livialdrinum í lutfallinum eitt til eitt.

**Skattanýskipanir kunnu geva sítt íkast til fíggjarpolitiskt haldføri**
Broytingar í skattaskipanini kunnu eisini geva eitt týðandi íkast til tess at tryggja fíggjarpolitiskt haldføri. T.d. hevði tað økt um landsins inntøkur, um bústaðarskattur varð settur í verk og rentustuðul til bústaðarlán varð avtikin, sí boks 3. Hesar nýskipanir kundu samstundis økt um støðufestið í føroyskum búskapi og tálmað sveiggjunum á tí føroyska bústaðarmarknaðinum.

Landsstýrið kann eisini tryggja landskassanum størri part av avkastinum fyri landsins fiskatilfeingi, tann sokallaða tilfeingisrentan.

22 Búskaparráðið tilskilar, at ein øking í pensjónsaldrinum frá 67 til 72 ár fram ímóti 2048 bøtir um haldføri við 1,9 prosentum av BTÚ.

23 Sí Finansministeriet, *Svar på Finansudvalgets spørgsmål nr. 386 (Alm. del) af 6. juni 2018 stillet efter ønske fra Benny Engelbrecht (S)*, 2. juli 2018 *(leinki)*.

Fiskivinnan kann sum avleiðing av tí lutfalsliga bíligu atgongdini til fiskirættindini geva avlop, ið er hægri enn fyritøkur á einum opnum og fríum marknaði við sama váða kunna.[24] Bílig atgongd til fiskirættindi kann eisini føra við sær, at manningarlønin á avvarðandi fiskiførum er hægri enn tann hjá løntakarum í øðrum vinnum, tá ið hædd er tikin fyri møguligum váðum og ampa í sambandi við at arbeiða umborð á skipi.

Tann lági skatturin á fiskatilfeinginum ávirkar ikki bara býtið av tilfeingisrentuni millum vinnu og landskassan. Eisini er vandi fyri, at hægri lønir og avlop í fiskivinnuni binda meira arbeiðsmegi og kapital í vinnuni enn neyðugt. Tað fer at darva produktivitetinum í vinnuni og harvið eisini vælferðini í Føroyum.

Tað nýggja landsstýrið, sum skipaði seg eftir løgtingsvalið 31. august førir fram í samgonguskjalinum, at fiskivinnunýskipanin frá 2017 skal broytast, sí boks 4. Uppskot til nýggja fiskivinnulóg varð send til almenna hoyring í oktober.[25] Landsstýrið vil, at teir partarnir av fiskikvotunum, sum verða seldir á uppboðssølu, verða lagdir um til loyvi, samstundis sum tær seldu kvoturnar ganga út.

Tað er týdningarmikið, at ágóðin til landskassan frá avgjøldum frá felags fiskatilfeingi ikki minkar í einari møguligari nýggjari nýskipan. Møguleiki er haraftur at økja inntøkurnar hjá landskassanum frá fiskivinnuni. Tað kann geva eitt íkast til ein haldføran fíggjarpolitikk tey komandi áratíggjuni.

Ein fiskivinnulóggáva við hóskandi smidleika kann virka við til, at fiskikvoturnar koma til gagns samfelagsbúskaparliga, og ein slík lóggáva kann tryggja, at tann tøkniliga menningin er til frama fyri vinnuna. Verða kvoturnar brúktar betri, fer tað at stimbra produktivitetsvøksturin í fiskivinnuni við m.a. at brúka fiskimegina á fullgóðan hátt, t.d. við at lækka talið av fiskiførum.

### Dømi um skattanýskipanir

Boks 3

Skattaskipanin kann tillagast á ymiskum økjum, t.d.:

**At seta bústaðarskatt í verk**
Føroyskir bústaðareigarar gjalda ikki grund- ella fastognarskatt. Vaksandi bústaðarprísirnir gera løtuna lagaliga at seta í verk ein bústaðarskatt, ið er ein skattakelda við fáum reingingum viðvíkjandi atferð hjá húsarhaldum sammett við onnur skattaobjekt. Bústaðarskattur er samstundis ein sjálvvirkandi útjavnari, ið kann gera bæði bústaðarmarknaðin og tann føroyska búskapin støðugari, um skattgjaldingin fylgir prísunum á bústaðarmarknaðinum.

**At taka rentustuðulin av**
Landskassin veitir stuðul upp á 35 prosent til rentuútreiðslurnar á bústaðarlánum. Stuðulin kann í mesta lagi vera 100.000 kr. Loftið er bert galdandi fyri hús upp til uml. 10 mió. kr, ið eru heilt fíggjaði við lántøku. Landskassin veitir við øðrum orðum peningahjálp til skuldfíggjað bústaðarkeyp, og tað ger, at prísstøðið verður hildið uppi. Tann lága rentan ger løtuna nú lagaliga til at avtaka rentustuðulin.

**Neutral skatting av føroyingum, ið starvast uttanlands**
Ikki so fáir føroyingar búgva í Føroyum, men arbeiða uttanlands, m.a. orsakað av hægri løn og einum stórum skattafrádrátti. Landsstýrið kann minka um frádráttin. Tað hevði ikki einans økt um skattainntøkurnar, men eisini bøtt um tørvin á arbeiðsmegi. Tað kann tryggja betri samsvar millum meirkostnað til m.a. dupult húsarhald, sum í veruleikanum er tað, sum skal til, tá ið arbeitt verður uttanlands og høvuðsbústaðurin er í Føroyum.

### Fyribils uppskot hjá landsstýrinum um at broyta reglurnar í fiskivinnuni

Boks 4

Løgtingið samtykti í desember 2017 eina nýskipan í kvotutillutingini, so ein avmarkaður partur av fiskikvotunum skuldi verða seldur á uppboði.[1] Tað nýggja landsstýrið vil avtaka uppboðssøluskipanina, so hesar kvotur aftur verða tillutaðar við rullandi loyvum, ið hava 10 ára uppsagnarfreist. Loyvini verða aftur knýtt at teimum ávísu skipunum, og landsstýrið miðar eftir at umsita fiskivinnuna sum eginkvotur (í fiskivinnubúskaparligum bókmentum verða hesar eginkvotur ofta umtalaðar sum einsæris fiskirættindi). Smidleiki og eggjan at lata kvoturnar upp í hendurnar á færri skipum kann tryggja, at skipanin ikki darvar produktivitetsvøkstrinum í fiskivinnuni.[2]

1. Sí lýsing av nýskipanini frá 2017 í greiningum hjá Danmarks Nationalbank av føroyskum búskapi frá 2017 (*leinki*) og 2018 (*leinki*).
2. Sí t.d. Peder Andersen, Udnyttelse af naturressourcer: EU og fisk som eksempel, *Samfundsøkonomen*, nr. 2, 2003.

24 Hetta er ein mekanisma, sum hevur verið kend leingi í fiskivinnubúskaparligari ástøði, sí t.d. Jens Warming, Om grundrente af fiskegrunde, *Nationaløkonomisk Tidsskrift*, nr. 49, s. 499-505, 1911, og Jens Warming, Aalegaardsretten, *Nationaløkonomisk Tidsskrift*, nr. 69, s. 151-162, 1931.

25 Sí Uppskot til Løgtinglóg um sjófeingi (*link*).

## UM GREININGINA

Sum ein avleiðing av leiklutinum hjá tjóðbankanum í samfelagnum verða greiningar um búskaparlig og fíggjarlig viðurskifti gjørdar.

Greiningarnar verða givnar út leypandi og fevna m.a. um metingar av aktuellu konjunkturstøðuni og tí fíggjarliga støðufestinum.

Greiningin er sett saman av einari danskari, enskari og føroyskari útgávu. Um ivi er um neyvleikan í týðingini, er tann danska útgávan galdandi.

DANMARKS NATIONALBANK
HAVNEGADE 5
1093 KØBENHAVN K
WWW.NATIONALBANKEN.DK

Ritstjórnin er liðug
1. november 2019.

**Sune Malthe-Thagaard**
Senior Economist

ØKONOMI OG PENGEPOLITIK

**Flora Nagy**
Bank Analyst

FINANSIEL STABILITET

DANMARKS NATIONALBANK